

Pidi Negro plagar vanliga at vera heima í Rumenien í summarfrí. Í ár verður talan kortini um eina virkna frítíð, nú húsini í Vestmanna skulu gerast liðug. Útsýninum hjá 33 ára gamla hondbóltsleikaranum bilar einki




RN MASKINVERKSTAÐUR

• Bilverkstaður
• Dekksøla
• Hita & Sanitet

Tel. 42 45 88
Fartel. 21 45 88
Fax 24 25 86


# – Eg má fáa mær húsini liðug

**Seinastu árini eru fleiri útlendsk ítróttarfólk komin til Føroyar. Fleiri teirra eru her eitt skifti, og fara síðani heimaftur. Ein teirra hevur kortini valt at verða verandi her, og enntá byggja sær egin hús – hondbóltsleikarin Pidi Negro, sum leygardagin reisti hús síni í Vestmanna**

VESTMENNINGUR
*Orð&myndir: Snorri Brend*

**Vestmanna:** Tey hondbóltshugaðu kenna Pidi sum tann høgi og vandamikli spælarin – fyrst hjá vestmenningum og síðani hjá hoyvíkingum.

Seinastu seks árini hevur hann verið við til at mynda føroyskan hondbólt. Men hvussu verður við hondbóltinum í vetur, dugir Pidi ikki at siga nakað um beint nú. Hann hevur í løtuni aðrar ætlanir.

Í hesum døgum er hann nevniliga í ferð við at byggja sær egin hús í nýggju útstykkingini í Vestri, ovarlaga í heimbygdini Vestmanna.

Heruppi hevur hann tað best hugsandi útsýnið yvir vøkru bygdina. Og her ætlar hann sær eisini at verða búsitandi í framtíðini.

– Eg fái at síggja, hvussu verður við hondbóltinum í vetur. Kanska verður tað ikki fyrrenn í desember-januar at eg fari við aftur.

– Eg veit ikki rættiliga. Eg má fáa mær húsini liðug fyrst, sigur Pidi.

Hann hevur í løtuni summarfrí, og nýtir tí ein stóran part av tíðini við at fáa nýggja heim sítt liðugt. Eftir ætlan skal hann flyta inn í tey í ár.

## Rumenskt vinalag

Pidi Negro kom til Føroyar fyri seks árum síðani. Hann kendi eitt av spælarapørunum hjá VÍF – familjuna Rápa – og soleiðis varð hann settur í samband við hetta kenda hondbóltsfelagið.

Áðrenn hann kom higar visti hann sera lítið um nýggja heimland sítt.

– Eg visti, at føroyingar og rumenar høvdu spælt landsdystir í fótbólti. Lítið meiri enn tað var tað ikki, sigur Pidi við einum brosi.

Eftir at hava spælt við felagnum í fýra ár, avgjørdi hann at skifta til H71, sum hevur heimstað sítt í Hoyvík.

At koma úr Rumenien til Føroyar var ein stór broyting fyri hann. Í heimlandinum var hondbólturin tað sum fór avstað við allari tíðini. Hondbólturin var so at siga arbeiði teirra, meðan ein her í Føroyum bert vandi nakrar ferðir um vikuna.

– Seinasta vetur gekk ikki so gott hjá okkum í H71. Vit vóru fremstir meginpartin av kappingini, men fingu bert bronsu at enda.

– Tað sá so gott út at byrja, men teir seinastu fimm dystirnar gekk ikki so gott, og tí gjørdust vit bert nr. 3, sigur Pidi.

## Timbur og skrúvir

Pidi kom til Føroyar á heysti 2000 og fekk beinanvegin arbeiði á fiskavirkinum í Vestmanna. Seinni fekk hann arbeiði í smoltinum, til hann at enda fekk arbeiðið, har hann nú er.